# Stevnan er imponerandi


*Bjarni Djurholm, Rodmund Nielsen og Petur Mohr Reinert vitja á básinum hjá Formula*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum var hósdagin á vitjan á Fish Fair-stevnuni í Runavík. Hann var sera fegin um tað, sum hann sá, og heldur, at tað hevur stóran týdning at fáa útlendingar hendanvegin til slíka stevnu**

LANDSSTÝRISMAÐUR
*Eyðun Klakstein*

Nógvir politikarar vóru á vitjan á stóru fiskivinnustevnuna, sum varð hildin í Runavík.

Hósdagin var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, á vitjan, og hann var á inni á gólvinum hjá ymiskum framsýnarum.

– Eg eri imponeraður av hesi stevnu, bæði av støddini og av útboðnum. Hetta er ein góður sýnisgluggi fyri føroyskar framleiðarar, sigur Bjarni Djurholm.

– Stigtakararnir hava verið dugnaligir, tí hendan stevnan er fyrmyndarlig. Her eru nógvir útlendingar, og tað hevur stóra týdning, at vit fáa teir at vitja hendanvegin.

# Missiónin í stevnuhýri

**Sjómanstrúboðin Torleif Johannesen var við á North Atlantic Fish Fair, men tað var ikki fyri at selja nakað. Hann tosar við sjómenn og vísir á arbeiðið, sum teir gera umborð á skipunum**

HÆGRI MAKTIR
*Eyðun Klakstein*



*– Tá løgdu skipin stilt sunnudag, men tað kann mann neyvan krevja í dag. Hinvegin hevði tað verið gott, um teir brúktu eina løtu til eitt møti, og tað kundi hóskandi verið um sunnudagin, sigur Torleif Johannesen, sum var við á North Atlantic Fish Fair*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Sosialurin í Runavík:** Í einum horni á stóru Fiskivinnustevnuni í Runavík snýr tað seg meira um tað andaliga enn tað verðsliga.

Við stórum stavum stendur »Føroyska Sjómansmissiónin« á einum skelti, og í meldrinum av flakalinjum, trukkum, amboðum og ymiskari útgerð leggur hetta hornið seg á annan bógv. Tí her liggja andaligar bøkur, sjónbond og sálmabøkur.

*Hvat selir tú?*

– Evangeliið er so dýrt, at eingin kann keypa tað, men samstundis fæst tað bara ókeypis, svarar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, í eini knappari vending.

Hann hevur fingið sær eitt lítið horn á matstaðnum, sum Sjómansheimið í Runavík hevur í einum av høllunum, og hann heldur, at tað er upplagt, at hann er við á stevnuni.

– Sjómansmissiónin vil vera ein natúrligur partur av fiskivinnuni, og tí vilja vit eisini vísa andlit á hesi stevnuni, sigur hann.

## Heilsan frá Jesusi

Vanliga leitar Torleif Johannesen umborð á skipini, har hann hittir sjómenn á máli, men seinastu dagarnar hevur hann hitt nógvar siglandi menn á gólvinum á North Atlantic Fish Fair.

– Eg havi prátað við nógvar sjómenn, og tað er hugaligt at hoyra, at teir eru fegnir um okkara arbeiði. Eg eri eisini altíð sera væl móttikin umborð, sigur hann.

Endamálið við arbeiðnum hjá Torleif Johannesen er at bera orðið um Jesus.

– Mín uppgáva er at bera eina heilsan frá Jesus, tá ið eg komi umborð á skipini, men tað er ymiskt, hvussu tað liggur fyri, tí við hvørt hava teir úr at gera, og so vil eg ikki órógva teir óneyðugt. Og onkuntíð hava teir fingið frí, so tá vil eg heldur ikki brúka alla teirra tíð, greiðir hann frá.

– Men eg havi nógvar góðar samrøður við sjómenn. Við hvørt er tað saman við fleiri, og til aðrar tíðir er tað undir fýra eygum.

## Brúka sunnudagin

Hann hevur ikki gjørt tað stóra burtur úr, nú hann skuldi á fiskivinnustevnuna, men ein faldari um virksemið hjá Føroysku Sjómansmissiónin er gjørdur til endamálið, og hann fer eisini at gera nyttuna aftaná stevnuna.

– Eg plagi at bera skipunum sjónbond og onkrar bøkur umborð, og eg hevði ynskt, at øll skipini settu eina løtu av til at vera saman um Guds orð. Tað gjørdu øll skipini í gomlum døgum, og tað vildi eg ynskt, at øll fóru at gera aftur, sigur Torleif Johannesen.

– Tá løgdu skipin stilt sunnudag, men tað kann mann neyvan krevja í dag. Hinvegin hevði tað verið gott, um teir brúktu eina løtu til eitt møti, og tað kundi hóskandi verið um sunnudagin.

## Syngja við sjónbondum

Á sjónbondunum, sum hann ber umborð, er andaligur sangur, og tað brúka summar manningar, tá ið teir eru saman til eitt møti ella andakt, tí so gongur sangurin betur.

Tað er Torleif fegin um at hoyra, tí hann sigur, at endamálið við bókunum og sjónbondunum er nevniliga at geva sjómonnunum nøkur amboð, sum teir kunnu brúka til at vera saman um Guds orð.

*Hevur tú fingið nakað burtur úr hesi stevnuni?*

– Eg veit ikki rættiliga, hvat eg skal fáa burturúr. Eg havi tosað við nógvar sjómenn, og tað hevur verið gott. Harafturat havi eisini fingið onkra kontakt, sum fer at hjálpa okkum við at finna ein hjálparfelagsskap í Litava, so vit kunnu senda brúkt klæði tann vegin, sigur hann.



# Fleiri vitjandi á Fish Fair enn í Glasgow

**Sigast má, at North Atlantic Fish Fair eydnaðist til fulnar. - Fyri tveimum árum síðan var stevnan ein »succes«, men tað er mangan torført at endurtaka nakað, sum eydnast so væl. Nú hava vit sjón fyri søgn; fiskivinnu-og alistevnan hesaferð var ein uppaftur størri »succes« enn seinast, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu**

EFTIR FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*



*- Hetta er best egnaða staðið til eina slíka stevnu. Eg veit ikki um nakað annað stað í heiminum, har ein fiskivinnustevna kann haldast á sjálvum havnalagnum. Hetta halda vit, er ein stórur fyrimunur hjá okkum, heldur Áki í Skemmuni*

Sløk 10.000 vitjandi ímóti stívliga 7.000 fyri tveimum árum síðan.

Hetta er úrslitið av altjóða fiskivinnu-og alistevnuni, North Atlantic Fish Fair, sum hevur verið hildin á havnalagnum í Saltangará týsdagin, mikudagin og hósdagin í vikuni, sum fer.

Fyrireikararnir, Áki í Skemmuni og Andrias Jacobsen, eru ovfarnir og sera væl nøgdir við undirtøkuna, sum framsýningin hevur fingið.

## Fleiri vitjandi enn í Glasgow

Andrias sigur, at altjóða fiskivinnu- og alistevnan í Føroyum hesaferð hevur verið nógv betur vitjað enn stevnan, sum hildin verður í Glasgow.

- Tað hevur víst seg, at undirtøkan fyri stevnuni í skotska stórbýnum hevur verið minkandi seinastu árini, og ein orsøk kann vera, at hon verður hildin á hvørjum ári, sum ivaleyst er ov ofta.

Sum skilst, er North Atlantic Fish Fair væl betri vitjað í ár enn stevnan, sum hildin varð í Glasgow fyrr í ár.

- Vit eru ovfarnir og ógvuliga fegnir um, at alt hevur gingið so væl hesaferð.

Andrias sigur, at tað verður ongantíð soleiðis, at alt gongur eftir vild, tá ið eitt so stórt og umfatandi tiltak skal reisast á føtur.

- Men tá ið úrslitið fyriliggur, og tað hevur gingið so væl sum hesaferð, eru øll glað, og tað eru vit eisini, sigur Andrias Jacobsen.

## Stórur vilji

Við døgurðaborðið umborð á Norrønu hóskvøldið eftir, at stevnan var liðug, segði býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen:

- Eg eri ómetaliga errin av tykkum báðum, Andriasi Jacobsen og Áka í Skemmuni, sum eiga størsta heiðurin av hesum tiltaki. Men vit eiga ikki at sovna í stoltleikanum, legði hann aftrat.

Rodmundur segði, at North Atlantic Fish Fair hevur sett Føroyar, Eysturoynna og Runavíkar kommunu á heimskortið.

- Stevnan er eitt úrslit av samstarvi og vilja millum fleiri partar her í kommununi.

Hann rósti Skipafelag Føroya og reiðaravirkinum, Beta, fyri, at feløgini vildu leggja virksemið niður, sum hann tók til, meðan stevnan hevur verið.

Goymslubygningarnir hjá hesum feløgum vóru nevniliga ein partur av framsýningarøkinum.

At enda heitti býráðsformaðurin á øll, sum vóru komin saman til døgurðaborðið, um at reisa seg og rópa hurrá fyri stigtakarunum og tiltakinum, sum nú er liðugt á hesum sinni.

## Á havnalagnum

Áki í Skemmuni takkaði øllum teimum, sum høvdu viðvirkað til, at North Atlantic Fish Fair kundi haldast undir so góðum umstøðum.

- Runavíkar kommuna hevur gjørt ein stóran innsats, har býurin hevur verið ruddaður og spulaður.

Hann takkaði eisini býráðnum fyri alla vælvild í samband við stevnuna.

- Vit vilja eisini takka vinnulívinum í kommununi fyri hjálpsemi og beinasemi og stovnum og feløgum fyri stuðul.

Áki segði, at North Atlantic Fish Fair ikki verður hildin í Runavíkar kommunu – bert tí, at hann og Andrias, sum stigtakarar, búgva her.

- Hetta er best egnaða staðið til eina slíka stevnu. Eg veit ikki um nakað annað stað í heiminum, har ein slík stevna kann haldast á sjálvum havnalagnum. Hetta halda vit, er ein stórur fyrimunur hjá okkum, segði hann.

Hann helt, at tað einasta, sum hevði gjørt økið uppaftur betur egnað, hevði verið, um øll stevnan kundi verið undir taki, og at eitt hotell var á staðnum.

Tað var rættiliga kalt í tjøldunum tann fyrsta dagin, tá ið væl var av vindi, men mikudagin var longu lýggjari, og hósdagin var alt, sum tað skuldi, segði Áki í Skemmuni.


*- Eg eri ómetaliga errin av tykkum báðum, Andriasi og Áka, sum eiga størsta heiðurin av hesum tiltaki. Men vit eiga ikki at sovna í stoltleikanum, segði Rodmundur Nielsen við døgurðaborðið umborð á Norrønu eftir, at hurðarnar á North Atlantic Fish Fair vóru lætnar aftur.*